# Kanningarstjóri til Jarðfrøðisavnið

Eitt nýtt starv sum kanningarstjóri á Jarðfrøðisavninum er leyst at seta frá 1. apríl 2001 ella skjótast til ber.

**Arbeiðsøki**
Kanningarstjórin verður leiðari á Kanningardeildini. Gjøgnum virkna luttøku í dagliga jarðfrøðiliga arbeiðinum skal kanningarstjórin samskipa kanningarvirksemið á stovninum.
Kanningarstjórin skal kunna átaka sær ein høvuðsleiklut í at tryggja stovninum eitt jarðfrøðiligt fakumhvørvi á høgum fakligum stigi, sum á nøktandi hátt kann loysa allar viðkomandi oljujarðfrøðiligar eins væl og meira alment jarðfrøðiligar uppgávur og í hesum sambandi eftir tørvi samskifta og samstarva við aðrar heimligar og altjóða kanningarstovnar, oljufeløg og ráðgevarafyritøkur v.m.
Við atliti at umsitingini av oljutilfeinginum og at oljujarðfrøðiligum kanningum í síni heild skal kanningarstjórin somuleiðis kunna átaka sær ein høvuðsleiklut í eitt nú samskipanini av jarðfrøðiliga eftirlitsvirkseminum og í ráðgevingini í sambandi við at leggja til rættis framtíðar útbjóðingarumfør og leitivirksemi í síni heild.

**Krøv til umsøkjaran**
Umsøkjarar mugu hava hóskandi akademiskt prógv innan jarðfrøði og/ella jarðalisfrøði, hollar royndir innan oljuleitingaryrkið og innan jarðfrøðiligt kanningarvirksemi í síni heild umframt góð samstarvs- og leiðaraevni. Kunnleiki til og royndir innan sedimentologiskt og/ella stratigrafiskt arbeiði er ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.
Roknast má við einum langtíðarstarvi. Tó verður starvið í fyrstu atløgu tíðaravmarkað frá tveimum til fimm ár, alt eftir hvat partarnir kunnu semjast um.
Fyri at tann, ið settur verður, skal kunna verða við í fyrireikingararbeiðinum fram ímóti teimum fyrstu boriverkætlanunum komandi summar, eigur starvið at verða sett skjótast til ber og í seinasta lagi 1. apríl 2001.
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Martin V. Heinesen, Jarðfrøðisavnið, tlf. 357000, fax 357001, t-bræv martinh@jfs.fo

Jarðfrøðisavnið, sum áður var deild á Føroya Náttúrugripasavni, er nú skipað sum vísindaligur kanningarstovnur undir Oljumálastýrinum. Samstundis virkar stovnurin í kolvetnisumsitingini sum samskipaður partur av stýrinum við ábyrgd fyri øllum jarðfrøðiligum viðurskiftum. Jarðfrøðisavnið hevur til endamáls at savna, varðveita, handfara og breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfrøðiligu náttúruvirðum. Stovnurin skal virka fyri, at løggáva og umsiting av jarðfrøðiligum náttúruvirðum verður grundað á framkomna og dagførda jarðfrøðiliga vitan.

Umsóknir við hjáløgdum CV, avriti av embætisprógvi, frágreiðing um arbeiðsroyndir v.m., skulu vera Jarðfrøðisavninum í hendi í seinasta lagi 12. februar 2001. Adressan er: **Jarðfrøðisavnið, Brekkutún 1, Postsmoga 3169, 110 Tórshavn.**

# Deildarleiðari til ALS

Starvið sum deildarleiðari á Tryggingar- & ávísingardeildini er leyst at søkja

Høvuðsuppgávan hjá deildarleiðaranum er, í góðum samskifti við starvsfólkið, at leiða og skipa dagliga arbeiðið á deildini.

Tryggingar- & ávísingardeildin, sum í løtuni hevur 12 starvsfólk, umsitur:

- vanligan arbeiðsloysisstuðul
- fiskavirkisskipanina
- arbeiðsávísing
- førleikagevandi tiltøk
- farloyvisstuðul
- flyting millum A-kassar og
- arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi

Starvið er fjølbroytt og avbjóðandi. Deildarleiðarin skal tí hava hóskandi útbúgving og góðar starvsroyndir, umframt hava gott innlit og áhuga í føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Viðkomandi skal vera før/ur fyri og hava hug til, við samstarvi og virkisfýsni, framhaldandi at menna tænastustøðið hjá deildini.

Arbeiðsloysisskipanin stendur støðugt fyri broyttum arbeiðsfortreytum, og skal deildarleiðarin hava evnir at tillaga seg broytingum í arbeiðsumstøðunum.

Deildarleiðarin myndar, saman við deildarleiðaranum fyri Fíggjar- & fyrisitingardeildina og stjóranum, dagligu leiðsluna á Arbeiðsloysisskipanini.

Løn sambært avtalu.

Starvið verður at seta sum skjótast. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal verða Arbeiðsloysisskipanini í hendi í seinasta lagi týsdagin 23. januar 2001.

Umsóknir skulu stílast til Elisabeth O. Gaardbo, stjóra á ALS, sum kann geva nærri upplýsingar um starvið á telefon 349537.

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 22 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.*

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
teldupostur: als@als.fo

# Almennir fundir

## hjá Hvalvíkar bygdarráð í 2001

verða hesar mánadagar kl. 19.00:

| | |
|---|---|
| 08. januar | 13. august |
| 12. februar | 10. september |
| 12. mars | 08. oktober |
| 09. apríl | 12. november |
| 14. mai | 10. desember |
| 11. juni | |

Mál, sum skulu verða viðgjørd á Bygdarráðsfundi skulu vera kommununi í hendi 7 dagar áðrenn fundin.

Frá 01. februar verður kommunuskrivstovan opin soleiðis:

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 08.00–13.00 |
| Týsdag | kl. 08.00–13.00 |
| Mikudag | kl. 08.00–13.00 |
| Hósdag | kl. 08.00–13.00 |

Hvalvíkar Bygdarráð

# KUNNGERÐ

## Frá útskiftingarnevndini fyri Hvalvík

Ongar atfinningar eru komnar til góðskumetingina, sum varð framløgd á fundi tann 5. des. 2000.

Eftir § 51 í lóg nr. 147 frá 27. mars 1939 við seinni broytingum verður góðskumetingin latin serskild til ákæru.

Kærufreistin er 3 mánaðir frá 20. januar 2001 at rokna. Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Yvirútskiftingarnevndina, Sorinskrivarin, postboks 28, 110 Tórshavn. Kærurnar skulu vera Sorinskrivaranum í hendi í seinasta lagi tann 20 apríl 2001.

Góðskumetingin er til skjals hjá kommununi í Hvalvík og á Matrikulstovuni í Tórshavn.

MATRIKULSTOVAN

www.sosialurin.fo



# Nú kundi Edmund ikki bara sær longur


*Jóannes Eidesgaard*

Eg havi mangan í mínum stilla sinni undrað meg yvir, hvussu samstarvssinnaður og semjusøkjandi Edmund Joensen hevur verið í rættaliga drúgva tíð av hesum andstøðuskeiði okkara. Samstarvið hevur verið fyrimyndarligt bæði okkara millum og millum tingfólk úr bæði Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum. Okkara felags styrki og okkara felags áhugi í at arbeiða saman hevur ligið í tí álvara, sum báðir flokkar hava sæð í politisku ætlan samgongunnar - nevniliga fullveldisætlanini.

Men í Sosialinum í gjár og í Dimmu fyri nøkrum døgum síðan sóu vit góða gamla Edmund Joensen aftur. Í greinini, sum ber heitið “Eingin øsing”, sigur sambandsformaðurin, at Anfinn Kallsberg, Høgni Hoydal og eg skulu vera samdir um, at friður skal valda, meðan loysingin fer fram, tí vit í útvarpinum høvdu mælt til eitt siðiligt og virðiligt orðaskifti fram til fólkaatkvøðuna.

Speirekandi, argandi og eina og aleina við trúgv upp á egin politisk evni, bólkar Edmund Joensen knappliga formann Javnaðarfloksins saman við oddamonnunum í fullveldisætlanini. Og knappliga verður hansara egni samstarvsflokkur í andstøðu bólkaður saman við loysingaflokkunum. Og niðurstøðan hjá Edmundi Joensen er, at nú eiga øll tey, sum vilja varðveita ríkisfelagsskapin, bert ein hyrða, og hann eitur sjálvandi Edmund Joensen.

Eg skal gera skjótt av í hesi grein.

Fyri tað fyrsta, so er Javnaðarflokkurin har, hann altíð hevur verið. Hvørki Edmund Joensen ella nakar annar kann gera okkum til loysingarflokk, hóast vit ikki sum hann seta okkum á afturpartin og bara siga “noy”. Javnaðarflokkurin er ikki fyri loysing, hóast Edmund Joensen dúgliga áður hevur roynt at givið okkum hetta spjaldrið, men vit hava hin vegin einki ímóti, at vit føroyingar átaka okkum størri og størri ábyrgdir av hesum landi. Hetta er alt lýst nágreiniliga í okkara sjálvstýrislóg. Fyri tað næsta, so vil eg veruliga mæla til eitt virðiligt og sinniligt orðaskifti fram til fólkaatkvøðuna, tí tað skylda vit Føroya fólki. Harvið er ikki sagt, at vit ikki fara at bera boðskapin kláran og greiðan fram. Okkara rødd skal ríkiliga hoyrast, tá tann tíð kemur.

Men hetta var sanniliga hugstoytandi at lesa fyri okkum í tingmanning Javnaðarfloksins, tí ikki so lítið arbeiði liggur frá serliga okkara síðu í tí felags arbeiði, sum er komið frá stóru andstøðuflokkunum.

Men uppaftur meira hugstoytandi er tað at vita, at Edmund Joensen trýr, at arbeiðið fyri framhaldandi ríkisfelagsskapi verður styrkt av, at hann nú vil vera í sjálvdrátti. Við egnum vilja roynir hann at seta kílar niður ímillum Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin. Hann átti at vitað, at slíkt bert kann styrkja samgonguna.

# Heilsan til Eskild Norðbúð

Í dag verður ein kendur klaksvíkingur, Eskild Norðbúð, 80 ár, og verður í hesum sambandi ynskt hjartaliga tillukku við degnum.

Hóast komin til árs, so er Eskild framvegis sera léttur á fótum – og sinnið hevur hann eisini létt. Hugsaði um, tá hann fyri nøkrum árum síðani var illa sjúkur. Eg møtti honum, tá hann var komin á føtur aftur, og segði nakað soleiðis: »Nú, ert tú komin fyri teg aftur, Eskild?«, og hann svarar, léttur sum altíð, at tað skuldi bara manglað…

Eskild hevur altíð verið heilhjartaður javnaðarmaður, og var hann soleiðis sera virkin í Norðoyar Javnaðarfelag, kanska serliga í fimmti- og sekstiárunum, tá hann var nevndarlimur og eitt skifti formaður. Eskild varð valdur í kommunustýrið í Klaksvík, sum sat frá 1966-70.

Hjartaliga tillukku við degnum, Eskild!

***Vinarliga***
***Vilhelm Johannesen***

# Bíbliufrasýning í Havn

**Det Danske Bibelselskab**
*Peter Birch, forlagschef*

Listasavn Føroya og Det danske Bibelselskab åbner på lørdag en udstilling med Hendes Majestæt Dronning Margrethe II's biblelske vignetter i Tórshavn. Vignetterne og den særlige bibeludgave, de er blevet skabt til, vil kunne beses i Listasavn Føroya i perioden 20.januar-18 februar. Rigs- og slægtsbibelen udkom i slutningen af år 2000 på færøsk, grønlandsk og dansk. Udstillingen er nærmere beskrevet i vedlagte folder.

Den færøske udgave af Rigs- og slægtsbibelen udkom i forbindelse med en omfattende fornyelse af den samlede færøske i bibelkollektionen i slutningen af år 2000. De nye tidsvarende færøske bibeludgaver er blevet til i et tæt samarbejde med Det Danske Bibelselkabs stiftsudvalg på Færøerne og det er vort håb, at biblerne vil blive til glæde og velsignelse i folk og kirke på Færøerne.


# GRAMEX

## Útgjalding úr Gramex-grunninum

Heitt verður á øll, ið framleiða føroyskar plátur, bond og ljómfløgur, um at senda skjalprógvað tilfar um, hvussu nógvar eindir av LP/MC/CD hvør einstakur framleiðari ella virki hevur framleitt í tíðarskeiðnum 01.01.2000 til 31.12.2000.



Upplýsingarnar kunnu vera váttan frá veitaranum um, hvussu nógvar eindir av hvørjum verki eru gjørdar. Avrit av fakturum yvir eindirnar kunnu eisini góðtakast.

Eru ivamál hesum viðvíkjandi, kunnu tit ringja til:
Gissur Patursson
Tlf. 319820 / 213535, fax 314955
Kristian Blak,
Tlf. 314815 / 225034, fax 314825
Hans Pauli Torgarð
Tlf. 312043 / 221638, fax 318617

Mannagongdin er síðani, at allar eindirnar verða taldar saman í stigum, ið so verða nýtt, tá samlaða upphæddin frá GRAMEX skal býtast.

Sjálv útgjaldingin verður í feb/mars 2001

Alt tilfar skal sendast til:
**Framleiðslufelagið • Postboks 1057 • FO-110 Tórshavn**



**Minnist til hesar váttanir:**
1. Váttan um framleiddar eindir
2. Avrit av faktura
3. Váttan frá studio um tal av eindum ella tvítøkum

**Seinasta freist fyri innlating er 1. februar 2001**